MENTANARGRUNNUR LANDSINS

Tórshavn, 28. januar 2026
**Tíðindaskriv frá Mentanargrunni Landsins**

# Starvsløn og íverksetanarstuðul 2026

Nevndin í Mentanargrunni Landsins hevur gjørt av at lata **starvsløn** og **íverksetanarstuðul** til listaligt og mentanarligt arbeiði fyri 2026. Støðið á umsóknum til starvsløn og íverksetanarstuðul var sera høgt til hetta stuðulsumfarið og grunnurin fekk nógvar dygdargóðar umsóknir.

**Starvsløn** varð latin

- Barbaru í Gongini, listafólki í 12 mánaðir
- Annu Katrin Ø. Egilstrøð, tónaskaldi í 6 mánaðir
- Kim Simonsen, rithøvundi í 6 mánaðir

Harumframt fingu 58 umsøkjarar starvsløn í ávikavist 1, 2, 3, og 4 mánaðir.

Grunnurin fekk í alt 97 umsóknir, og søkt varð um starvsløn fyri slakar DKK 25 mió. Av hesum vóru 61 umsóknir játtaðar. Latnar vóru 107 mánaðarlønir fyri tilsamans DKK 4,5 mió.

Starvsløn verður latin umsøkjara við støði í verkevni ella verkætlan, sum lýkur krøvini í Løgtingslóg nr. 84 frá 17. mai 2000 um Mentanargrunn Landsins, og sum eftir nevndarinnar meting er av listaligum ella fakligum dygdareyðkennum. Starvslønin svarar til læraraløn á fólkaskúlans lønarstigi 21, stig 1, umframt 15% í eftirløn.

Nevndin hevur viðgjørt umsóknirnar eftir ásetingunum í kunngerð nr. 109 frá 21. september 2000 um Mentanargrunn Landsins, sum broytt við kunngerð nr. 2 frá 6. januar 2025, ið hevur til endamáls at geva listafólkum og øðrum, ið takast við mentanarligt virksemi arbeiðsnáðir í eitt ávíst tíðarskeið at starvast burturav við listaligum ella øðrum mentanarligum arbeiði.

**Íverksetanarstuðul** varð latin

- Hans Haldór Poulsen (tónleikur)
- Maibritt Marjunardóttir (listhandverk)
- Una Debess (tónleikur)
- Theodor Kapnas (tónleikur)

Endamálið við **íverksetanarstuðuli** er at stuðla einstaka skapandi yrkislistafólkinum, serliga ungum listafólki. Íverksetanarstuðulin skal lætta um hjá evnaríkum listafólkum at koma víðari við teirra skapandi listaarbeiði. Stuðulin verður latin verkætlan, ið nevndin metir hevur listalig dygdareyðkenni. Íverksetanarstuðulin er DKK 75.000 árliga.

Umsøkjarar til íverksetanarstuðul vóru 19 í tali, og nevndin gjørdi av at lata 4 umsøkjarum íverksetanarstuðul fyri tilsamans DKK 300.000.

Hedvig Westerlund-Kapnas luttók ikki í viðgerðini av umsóknum til íverksetanarstuðul fyri 2026.

Vegna nevndina
Hedvig Westerlund-Kapnas, forfólk
Mentanargrunnur Landsins

MENTANARGRUNNUR LANDSINS
LÜTZENSTRØÐ 4 - FO-100 TÓRSHAVN - MENTAN@MENTANARGRUNNUR.FO - TLF. 320842 - 220845